## Konsert í Listasavninum á Sandi



Summartónar eru so smátt við at hæsa av á hesum sinni. Hóast mánadagurin er seinasti dagurin á Summartónum, so verða tó tiltøk við Gjógv, ið eru partur av hesi tónleikastevnu, allan juli mánað. Mánakvøldið 2. juli kl. 20.00 verður konsert á Sandi, har gittarleikarin Ólavur Jakobsen fer at framføra í Listasavninum, ið Sofus Olsen, sáli, gav heimbygdini. Á skránni er tónleikur fyri sologittara. Umframt barokktónar og tónleik við íblástri frá Mozart, fer Ólavur at framføra nýskrivað gittarverk hjá sandinginum Sunleifi Rasmussen, ið varð framført á fyrsta sinni á konsert í Havn mikukvøldið. Verkið er skrivað til Ólav og skal tað framførast aftur á konsertferð seinni í heyst til m.a. Keypmannahavn og Wien. Konsertin varir í lítlan tíma og fáast atgongumerki til keyps við dyrnar.

## Roskilde Festival byrjaður

Hóast kendi danski tónleikafestivalurin ikki alment byrjar fyrr enn hósdagin, eru longu fleiri túsund fólk streymað til festivaløkið mitt í Roskilde. At møta fleiri dagar áðrenn festivalbyrjan hevur verið fastur táttur í fleiri ár, og ikki gongur hetta altíð líka friðarliga fyri seg. Eisini hesaferð hevur løgreglan havt úr at gera við fullum fólki, stuldri og øðrum. Í morgin verður styrkt lið av løgreglumonnum fingið á staðið.

# Taka hattin av fyri Tvøroyri

**Býráðið hevur sett sær fyri at gera Tvøroyri til tryggasta bý í landinum og tað er nakað, sum allir politikarar eiga at spegla sær í, sigur Ráðið fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Soleiðis er ætlanin, at nýggi miðbýurin á Tvøroyri skal síggja út. Á vegamótinum niðan av havnarlagnum skal rundkoyring gerast og annars verður nógv hugsað um útsjónd við trøum, runnum, torgum og túnum*

- Hetta er ógvuliga spennandi og hetta er avgjørt nakað, sum allar kommunur í Føroyum eiga at spegla sær í.

Jón Kragesteen, dagligur leiðari í ráðnum fyri ferðslutrygd, er ómetaliga fegin um stórfingnu ætlanina hjá Tvøroyrar Kommunu á ferðslutrygdarøkinum.

- Vit kunnu ikki annað enn taka hattin av fyri tvørafólki, sigur Jón Kragesteen.

Tvøroyrar Kommuna hevur lagt eina miðvísa ætlan, sum hevur til endamál at gera Tvøroyri til ferðslutryggasta pláss í landinum.

Sostatt hevur kommunan gjørt eina ferðslutrygdarætlan, sum umfatar alt Tvøroyri, heilt úr Froðba, inn í botnin í Trongisvági.

Ætlanin umfatar alla Sjógøtu, sum er tann niðari høvuðsvegurin og síðugøturnar, sum eru bundnar í hana.

Hinvegin er ætlanin, at sum frálíður skal øll tung ferðsla beinast eftir tí ovara høvuðsvegnum, sum liggur omanfyri tað tættastu búsetingina.

- Onkrar Kommunur í landinum hava lagt onkrar ferðslutrygdarætlanir fyri ávísar øki í einum býi, men tað er ógvuliga avmarkað og ætlanin hjá Tvøroyri er tann fyrsta í Føroyum, har ein kommuna fer undir eina heildarætlan fyri at kalla allan býin, sigur Jón Kragesteen.

Hann fegnast eisini um, at ætlanin fyri Tvøroyri liggur ógvuliga tætt uppat teimum tilmælum, sum Ráðið fyri ferðslutrygd hevur um, hvussu ferðslan eigur at verða skipað, fyri at bøta munandi um trygdina.

Hann er eisini hugtikin av mátanum, sum Tvøroyrar Býráð er farið til verka upp á í hesum sambandi.

- Her er talan um eina tvørfakliga verkætlan, har arkitektar og verkfrøðingar hava arbeitt saman um at skapa eina so góða heildarloysn sum gjørligt, har tað bæði verður hugsað um tekniskar loysnir og útsjóndina. Men harumframt hevur ein borgarligur fylgibólkur av vanligum tvørafólki verið við og er komin við mótspæli og hugskotum.

### Nýskapandi ætlan

Eftir ferðslulógini er loyvt at koyra 50 kilometrar um tíman í bygdum øki, men eitt afturvendandi tilmæli frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd hevur verið at lækka hámarksferðina niður í 40 ella enn longur niður í bygdum øki.




*Hendan talvan er ein orsøk til, at Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til at lækka hámarksferðina í bygdum øki. Kanningar vísa nevniliga, at verður fólk ákoyrt av bili, sum koyrir 40 kilometrar um tíman, er vandin fyri at doyggja av stoytinum 30%. Men koyrir bilurin 50, er vandin fyri at doyggja heili 80%. Á Tvøroyri skal ferðin setast niður í 40 kilometrar um tíman*

Ein týðandi partur í ferðslutrygdarætlanini á Tvøroyri er nettupp at seta hámarksferðina niður í 40 kilometrar um tíman ígjøgnum allan býin.

Men fyri at tálma ferðini enn meiri, er ætlanin at gera nøkur heilt serlig steðgipláss til bussar, sum ikki eru nakra aðrastaðni í Føroyum.

Í hesum sambandi er ikki ætlanin, at bussarnir skulu inn til síðuna at steðga at seta fólk at og taka fólk upp í.

Tvørturímóti er ætlanin at gera serligar busslummar, har vegurin við hvørt steðgipláss verður smalkaður niður í eitt spor, so at bussurin í roynd og eru steðgar mitt á vegnum. Sostatt kunnu fólk fara í bussin ella úr honum beint av gongubreytini í bæði borð.

- Tað ger, at bæði bilar, sum koma ímóti bussinum og bilar, sum koma aftaná honum, mugu steðga á, ímeðan bussurin setir fólk av og tekur fólk upp í.

Tað henda nógv óhapp og nógvar vanlukkur, tí at bussar noyðast at skifta spor, hvørja ferð, teir stegða at seta fólk av og taka fólk upp í, men við hesum serligu buss lummunum, slepst undan at skifta spor.

Í ferðslutrygdarætlanini hjá Tvøroyrar Kommunu er ætlanin at gera sjey slíkar busslummar á vegastrekkinum ígjøgnum býin.

Jón Kragesteen sigur, at hetta slagið av busslummum eru ikki ókendir uttanlands, eitt í Gøteborg í Svøríki.

- Í Føroyum hevur vanliga atfinningin verið, at tað ber ikki til at hava slík steðgipláss í Føroyum, tí ferðslan er so nógv.

- Men í Gøteborg hava tey roknað seg fram til, at hesir busslummarnir tola eina ferðslu upp á 5000-8000 bilar um dagin.

- So nógv ferðsla er ikki nógva staðni í Føroyum og so slett ikki á Tvøroyri.

Jón Kragesteen sigur, at Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir eisini til, at Løgting og landsstýrið áleggja øllum kommununum at gera slíkar ferðslutrygdarætlanir, men enn er tað ikki hent.

Men at so mikið meiri prísverdugt er tað, at Tvøroyrar Býráð fer undir eina so víðskygda ætlan, áðrenn tað er lógarkrav, heldur hann.

## Skulu finna tryggastu pláss í landinum

**Ráðið fyri ferðslutrygd fer nú at skriva út kapping um at finna ferðslutryggastu bygd í Føroyum**

Nú skal ferðslutryggasta pláss í landinum finnast.

Tað er endamálið við eini kapping, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd nú fer at skriva út.

Jón Kragesteen sigur, at tað var á seinasta ársfundi hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, at gamli formaðurin, Petur Jacob Sigvardsen, skeyt upp at skriva út kappingina um Føroya ferðslutryggasta bygd.

Vágafólk, sum vóru á fundinum gjørdu bart og søktu gávugrunnin hjá Eik um stuðul til kappingina og grunnurin læt 50.000 krónur til kappingina.

Hesi somu vágafólk sita nú í einum arbeiðsbólki og fyrireika kappingina og Jón Kragesteen vónar, at kappingin kann verða næsta ár.